




# Kvøldlot skal gerast til fína matstovu og dansihøli

**Høgni Danielsen eigur bygningin, har Kvøldlot fyrr helt til. Hann hevur ætlanir um at gera matstovu og dansihøli í honum. Arbeiðið hevur gingið striltið, men nú kemur gongd á aftur**

KVØLDLOT
*Stefan í Skorini*


*Bygningurin, har Kvøldlot helt til, hevur leingi staðið heldur óvakur mitt í býnum. Nú sleppur eigarin væntandi í gongd við at gera matstovu og dansihøli í bygninginum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Høgni Danielsen hevur søkt Tórshavnar býráð um at ríva gamla bygningin niður og byggja uppaftur av nýggjum. Hetta skal byggi- og býarskipanarnevndin taka støðu til á næsta fundi, og tá fær Høgni endaliga at vita, um hann kann ríva niður. Um hann ikki fær loyvi til tess, má hann taka gamla betongið niður í pettum. Hetta er torførari og meira tíðarkrevjandi.

Ein partur av bygninginum er stoyptur umaftur, men tað, sum ikki er stoypt umaftur, skal helst rívast niður, sambært eigaranum, sum hevur átt bygningin í fimm ár.

– Tann parturin av bygninginum, sum vit ikki hava styrkt, er í sera ringum standi og einki verdur. Betongi er illa farið, og tí hevði tað besta verið at rivið hann niður, sigur Høgni Danielsen.

## Gingið striltið

Arbeiðið við at umbyggja gamla Kvøldlot hevur leingi ligið á láni, tí stríð við grannar og býráðið hevur tarnað arbeiðnum somikið nógv, at torført hevur verið at fáa gongd á.

Fyrst misti Høgni tað økið, har rottangin, oljutangin og oljufýrið stóðu á, og tí mátti hann flyta tað inn í bygningin. Eisini skuldi neyðhurðin flytast í annað stað. Hetta hevur tarnað arbeiðnum nógv, samstundis sum býráðið skal góðkenna allar ætlanir.

Arbeiðið hevur staðið stilt í hálvtannað ár, men nú kemur væntandi gongd á aftur. Orsøkin til at steðgur kom í arbeiðið var, at býráðið kravdi nýggjar tekningar av bygninginum, tí tað kravdi ymsar broytingar. Samráðingar millum partarnar hava verið drúgvar, og tí er arbeiðið so nógv seinkað.

Í løtuni arbeiðir Høgni við at grava út í niðaru hæddini, har hann ætlar, at pláss skal vera fyri fýrrúmi. Øll tann niðara hæddin skal gravast út, so rúmligari verður í bygninginum.

Høvuðsdyrnar og neyðútgongdin skulu vera omaneftir móti sjónum, og Høgni hevur fingið loyvi at byggja einar tríggjar metrar omaneftir.

## Tørvur á matstovum

Hóast fleiri matstovur eru í høvuðsstaðnum, so heldur Høgni Danielsen avgjørt, at tørvur er á einari afturat. Hann sigur, at fólk mangan hava trupulleikar at fáa pláss á matstovum um vikuskiftið.

Ætlanin er, at matstovan skal vera í ovaru hæddini, og dansihøli skal vera í neðra. Ovara hæddin er 185 fermetrar, og niðara hæddin er 165 fermetrar. Sostatt er hampuligt pláss, tá alt er liðugt.

Navnið á matstovuni verður Maxim og dansihøli verður kallað Royal Club. Sum nøvnini benda á, so verður hetta staðið í fínara endanum. Væntandi fer eigarin at leggja seg eftir at fáa meira tilkomin fólk á vitjan.

Høgni Danielsen torir ikki at siga nakað um, nær bygningurin stendur klárur at taka í nýtslu.

# Bjørk vanligasta gentunavnið í fjør

**Av teimum nøvnum, sum vórðu givin gentubørnum í fjør, var Bjørk best umtókt millum foreldur. Jógvan var hinvegin mest nýtta dreingjanavnið**

NØVN
*Stefan í Skorini*

Níggju av teimum gentubørnum, sum vórðu fødd í fjør, fingu navnið Bjørk. Einki annað gentunavn er so nógv nýtt. Bjørk hevur ikki verið vanligt navn í Føroyum, men broyting tykist vera komin í. Hetta stendur at lesa í Hagtíðindum.

Navnið Hanna var á øðrum plássi. Sjey gentur fingu navnið Hanna. Næst á listanum vóru nøvnini Anna, Maria, Marjun, Annika, Bára, Julia, Rakul og Vár.

Líkt er til, at Jógvan er mest nýtta dreingjanavnið í 2000. Tólv dreingjabørn, sum vórðu fødd í fjør, vórðu kallað Jógvan. Eingi óvanlig dreingjanøvn eru at síggja ovast á listanum.

Tíggju fingu navnið Hans, Heini og Jákup. Onnur nógv nýtt nøvn vóru Magnus, Jóhannes, Rani, Andrias, Dávid, Jóhan, Magni, Dánjal, Petur og Poul.

Um leitast skal eftir óvanligum dreginjanøvnum, so fingu trý dreingjabørn navnið Silas, og somuleiðis trý fingu navnið Tóki.

Vanligastu nøvnini í Føroyum eru Anna og Hans. 864 eita Anna, og 835 eita Hans. Hesi bæði nøvnini verða eisini nógv nýtt í samansettum nøvnum. 107 eita Anna Maria, og 90 eita Hans Jacob. Næst á listanum eru Jógvan og Maria.

## Eftirnøvn

Av teimum nýføddu í ár 2000 fingu tey flestu eftirnavnið Joensen. 34 av børnunum bera hetta eftirnavnið, meðan 32 hava navnið Jacobsen. 31 hava navnið Hansen. Síðani koma Petersen, Olsen og Poulsen.

Vanligasta eftirnavnið í Føroyum er eisini Joensen. 2.601 fólk eita Joensen. Næstan eins nógv eita Hansen og Jacobsen.

# Fólkatalið veksur í hvørjum

**Í dag búgva 46.611 fólk í Føroyum. Hetta er ein vøkstur uppá 415 fólk seinastu fimm mánaðirnar**

FÓLKATAL
*Stefan í Skorini*

Nýggjasta uppgerðin yvir fólkatalið frá Hagstovuni vísir, at fólkatalið í Føroyum er støðugt vaksandi. Við ársbyrjan í ár búðu 46.196 fólk í Føroyum, men nú eru vit 415 fleiri.

594 fólk eru flutt til Føroya, meðan 327 eru flutt úr Føroyum. Hetta gevur eina nettoflyting uppá 267 fólk.

Burðaravlopið er 148. 139 fólk eru deyð, meðan 287 eru fødd í sama tíðarskeiði.